# Umsjónarfólk til fríðkanartoymið

Søkt verður eftir umsjónarfólki til fríðkanartoymið hjá Vestmanna Kommunu at byrja skjótast til ber.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:
• tilrættalegging og skráseting av uppgávum á økinum hjá toyminum
• fríðkan av gøtum og øðrum kommunalum økjum
• gróðurseting og sláing av kommunalum økjum
• aðrar fyrifallandi uppgávur

Umsjónarfólkið kemur partvíst at arbeiða sjálvstøðugt, og skal tí duga at leggja sín egna arbeiðsdag til rættis.
Ynskiligt er, at tann setti hevur viðkomandi útbúgving ella royndir.
Tann setti skal hava koyrikort til persónbil. Koyrikort til lastbil og kranaloyvi er ein fyrimunur.
Tilvísing er til arbeiðsmannin hjá Vestmanna Kommunu.

Talan er um fulltíðarstarv, sum verður lønt sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og KAF, ella millum Føroya Arbeiðarafelag og KAF, um tann, ið settur verður, ikki hevur viðkomandi útbúgving.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til teknisku deild, tlf. 770105.

Umsóknir skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. juni 2019 kl. 12.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**